# Toyota nýggjheitir




*Tríggjar nýggjheitir frá Toyota f.v.: Toyota Avensis, Toyota Urban Cruiser og Toyota iQ*




Leygardagin 27. juni var opið hús hjá Reyni Service í Hoyvík í sambandi við at fleiri nýggj Toyota modell eru komin á marknaðin: Minibilurin Toyota iQ, nýggjasta modellið av Toyota Avensis og Toyota Urban Cruiser.

Toyota iQ er ein minibilur, sum er minni enn 3 metrar langur. Talan er um tann minsta minibilin til fýra persónar á marknaðinum. Bilurin verður gjørdur bæði sum bensin og diesel.

Nýggur Toyota Avensis er eisini komin á marknaðin. Talan er um triðju generatión av Avensis, sum er ein sera týðandi bilur hjá Toyota og ein av teirra mest seldu bilum. Avensis fæst bæði í bensin- og dieselútgávum sum sedan og stationcar.

Toyota Urban Cruiser er ein sonevndur crossover, sum er ein av hesum nútímans rúmligu familjubilunum við kassalíknandi designi og liðiligari innrætting. Í støðd er Urban Cruiser millum Toyota Yaris og Auris. Bilurin er líka undir fýra metrar langur og fæst bæði í bensin- og dieselútgávum sum 4x4.

**mg**

# Berg Motors selja nú Renault



*Axel Ljósheim og Jákup Jacobsen, sølumenn hjá Berg Motors, sum nú eisini selja Renault*



Frá 1. juli 2009 at rokna er Berg Motors alment umboð fyri Renault í Føroyum. Síðan bilasølan VR-Bilar gavst um ársskiftið, hevur Renault einki umboð havt í Føroyum.

Fyri góðum tveimum mánaðum síðan settu Renault Danmark seg í samband við Berg Motors um at umboða teirra bilar. Síðan hava samráðingar verið millum partarnar, og nú er Berg Motors alment Renault umboð í Føroyum.

Renault hava bilar í øllum støddum. Tann minsti er Renault Twingo, síðan koma Clio, Kangoo, Modus, Mégane, Scénic, Laguna, Koleos og Espace, umframt vørubilarnar Trafic og Master sum fáast í fleiri ymiskum støddum og útgávum.

**mg**




## BMW 318 TDS til sølu

Ein svartur BMW 318 TDS (diesel) er til sølu fyri 40.000 krónur.

Bilurin er skrásettur fyrstu ferð hin 11. juni 1996 og er í góðum standi

**Áhugaði ringið tel: 223369**